# Innbjóðing til FK-Cup 2016

**Til flogbóltsfeløgini**

Árliga FK-Cup fyri eldri deildir verður **leygardagin 24. sept. 2016.** Lið, sum ikki luttaka í FM-kappingini, eru vælkomin at luttaka.

FK Cup fyri yngri deildir verður kunngjørt seinni.

Tilmelding til FK-Cup fyri eldri deildir skal verða Fleyr í hendi **innan 17. september 2016 kl. 18:00**

Tilmelding skal sendast til teldupost: **fleyr@fleyr.fo** **(cc. Christina.nolsoe@skulin.fo ). Heitt verður á feløgini um at senda eina samlaða tilmelding fyri øll liðini í felagnum samstundis. Hetta hjálpir okkum almikið ☺**

**Eru spurningar, eru tit vælkomin at ringja til Christinu Nolsøe telefon 289657 ella á telduposti fleyr@fleyr.fo.**

**Luttøkutreytir:**

Luttøkugjald:
Meistaradeildin: kr. 500,00
1. og 2. deild: kr. 350,00

Gjaldast skal á kontu í BankNordik **6460 – 179.646.3**

Er luttøkugjald ikki móttikið innan ásettu tilmeldingarfreistina 17. september kl. 18.00, kann nevnda lið/felag roknast sum ikki tilmeldað.

**Eldri deildir:** Luttakandi lið hava skyldu at hava dómarar til dystirnar í bólkunum. Harafturat verður heitt á leikararnar um at hjálpa til við at døma finalu umfør. Kappingin verður hildin í Høllini á Hálsi og í Gundadalshøllini.

Tit frætta nærri, tá ið kappingin er løgd. Vit miðað eftir at skráin fyri kappingina er klár mánadagin áðrenn kappingarnar byrja ☺

Broytingar verða ikki gjørdar aftaná, at tilmeldingarfreistin er úti.

Vit gleða okkum at bjóða tykkum vælkomnum til FK-Cup 2016.

Við flogbóltskvøðu
Flogbóltsfelagið Fleyr

Christina Nolsøe
Samskipari